# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



*Sólvá Jacobsen eigur og rekur húðrøktarstovuna Fango í Torkilsgøtu 8 í Hoyvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sólvá Jacobsen, kosmetologur:

## Húðrøktarstovan Fango latin upp í Hoyvík

Húðrøktarstovan Fango er nú latin upp aftur í Torkilsgøtu 8 í Hoyvík.

Tað er Sólvá Jacobsen, sum eigur og rekur Fango. Hon er 34 ára gomul og útbúgvin kosmetologur.

Hon byrjaði í 1999 á internationala kosmetologskúlanum, "Cidesco" í Aarhus. Síðan var hon í praktikk í Aarhus á klinikk Helle Thorup, har hon arbeiddi saman við fleiri øðrum kosmetologum. Hon tók endaligt prógv í apríl 2001.

Eftir at hava arbeitt 11 ár uttanlands flutti Sólvá heim til Føroya í juni 2001 og stovnaði húðrøktarstovuna "Fango" í J. Paturssonargøtu í Havn. Har var hon til 1. november 2003, tá hon fór í barnsburðarfarloyvi.

Hjá húðrøktarstovuni Fango verða gjørdar ymiskar viðgerðir so sum andlitsviðgerðir, vippir og brýr, hendur (manicura), føtir (pedicura), epilering, voksviðgerð av hárið o.a.

Adressan er Torkilsgøta 8, Hoyvík, og bílegging á tlf 312021.

Simme Musikkhús, Tórshavn:

## Fingið heiðursprísin "Fender Top Dealer Award 2003"




*Simme A. Jacobsen við heiðursprísinum, sum hann tekur sum eitt veruligt heraklapp*

*Mynd Jens Kristian Vang*

**Simme Musikkhús hevur fingið heiðursprísin "Fender Top Dealer Award 2003" tillutaðan frá Fender Skandinavia**

Fender er ein stór amerikansk fyritøka, sum framleiðir musikkinstrument sum t.d gittarar og forsterkarar.

Simme A. Jacobsen sigur, at hann er sera fegin um hendan heiður, og hann tekur tað sum eitt veruligt herðaklapp. Hann hevur fingið prísin fyri at hava gjørt vart við seg í branchuni.

Simme hevur handlað við ljóðførum síðan 1959. Fyrstu árini fekk hann Fender instrumentini beinleiðis úr USA. Nú er høvuðssætið hjá Fender í Skandinavia í Gøteborg í Svøríki. Tað eru teir, sum hava innstillað Simma til at fáa Fender heiðursprísin.

Simme Musikkhús og "Bjarnastein Guitars" v. Petur M. Bjarnastein í Saltangará, sum framleiðir tann kenda Bjarnasteingittarin, arbeiða í løtuni við eini samanlegging av fyritøkunum við høvuðssæti í N. Finsensgøtu 7 í Havn.

## Jólahugni í Piddasahandli og Ribarhúsi



**Nú leygardagin 4.des. kl.10.00 byrjar jólasølan hjá Heimavirkisfelagnum í Fuglafirði**

Piddasahandil er á tremur við góðum jólagávuhugskotum. Her finnur tú heimavirkaðar prýðis- og brúkslutir av alskyns slag - alt frá fjálgum pløggum til fløgur og súltutoy.

Á "Kafé- kontórinum" í erva fæst allan dagin ein góður koppur av kaffi ella te við onkrum leskiligum afturvið, og sjálvandi er eisini eitt "jólapakka-tombola" á skránni.

Um middagsleitið verður tónleikur at hoyra í Ribarhúsi - Niels og Helgi Midjord syngja og spæla nøkur løg, og sangbólkurin Salt fer at framføra sangir av síni nýggju fløgu.

Henda leygardagin, 4. des., hava vit opið heilt til kl. 18.00. Sunnudagin 5. des. hevur Piddasahandil opið millum 16.00 og 18.00, í samband við at ein listaframsýning letur upp í Ribarhúsi.

Jólasølan heldur fram líka til jóla. Opið er hvønn dag frá kl. 15.00, tó leygardag frá kl. 11.00.

Verið hjartaliga vælkomin inn í tað hugnaliga og gamla "jólahúsið" mitt í býnum í Fuglafirði